VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinnapartin minni vindur av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið hósdagin og fríggjadagin:
Fleyr til gul av útsynningi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 7 og 11 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 3 og 7 stig.

DAGSINS FØROYINGUR

»Vit hava arbeitt dag og nátt«

Edith Mørkøre finna vit inni í snotuligu Miðlon. Hon stendur og ráðgevur einum kunda inni í Inspiratión, har hon er leiðari.

Edith er gift við Kristoffur, og eiga tey hundin Diva.

– Tað er ein labradortík, men hon er so maskulin, so vit góðu henni eitt feminint navn, sigur Edith

Inna Tørnroos
inna@sosialurin.fo

– Edith Mørkøre er leiðari í nýopnaða handlinum Inspiratión

Mynd: Jens Kristian Vang

■ Hvat gjørdi tú áðrenn tú byrjaði at arbeiða her?
– Eg eri handilsútlærd í Timburhandlinum. Har starvaðist eg í átta ár. Seinastu seks mánaðirnar havi eg arbeitt í Casa.

■ Nær byrjaði tú her?
– Eg havi arbeitt her í tríggjar vikur. Tá eg kom higar vóru hølini tóm, og síðani tá hava vit arbeitt sera langar dagar fyri at fáa alt upp at standa. Nógvir danir hava eisini verið her, og hjálpt okkum.

■ Hvussu sum arbeiða her?
– Tað eru fýra sum eru knýtt at handlilnum. Men bara tvey sum arbeiða her fulla tíð.

■ Hvørjum hava tit selt nógv av nú í byrjanini?
– Tilboðsvørurnar hava vit selt nógv av. Serliga kannan Alfi hava fólk næstan skrikt vekk.

■ Hvat ger tú so tá tú ikki arbeiður?
– Tá máli eg listarverk.

■ Hvørjum vil tú heilsa?
– Manninum Kristoffur

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-13
Nuuk	-6
Qaqortoq	-2
Ammassalik	-3
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	2
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	7
Lerwick	3
Aberdeen	0
London	3
Tromsø	--
Bergen	2
Oslo	--
Stokkhólm	-2
Keypmannah.	-1
Helsinki	-4
Moskva	2
Berlin	-2
Warzawa	-2
Kiev	-1
Bukarest	3
Paris	1
Madrid	17
Róm	14
Malorca	16
Athen	--
Malta	12
Tunis	12
Beijing	8
New Dehli	24
Bangkok	34
Jakarta	31
Sydney	--
New York	11
Miami	24
Los Angeles	11
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	26

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 1006 hPa. við Hebridurnar fer suðureftir og grynnist. Eitt hátrýst, 1017 hPa. sunnan fyri Ísland mennist.



Í dag:
Hátrýstið yvir Botnisku Víkini breiðir seg vestureftir og gevur góðveður á okkara leiðum teir komandi dagarnar.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 13/3 kl. 06^{00}– 14/3. 06^{00}. Hitin í gjár: 7,0°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 23,0 mm – mált frá 13/3 kl. 06^{00}– 14/3 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í mars: 51,2 mm

VESTFALLSKYRRINDI

13. mars Mánin longst frá jørðini
14. mars Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
14. Mars	06.22	18.39	05.22	17.39	05.37	17.54	08.22	20.39	09.22	21.39	04.37	16.54	03.37	15.54	06.37	18.54	07.37	19.54	06.07	18.24	07.22	19.39
15. Mars	06.57	19.14	05.57	18.14	06.12	18.29	08.57	21.14	09.57	22.14	05.12	17.29	04.12	16.29	07.12	19.29	08.12	20.29	06.42	18.59	07.57	20.14
16. Mars	07.32	19.49	06.32	18.49	06.47	19.04	09.32	21.49	10.32	22.49	05.47	18.04	04.47	17.04	07.47	20.04	08.47	21.04	07.17	19.34	08.32	20.49
17. Mars	08.06	20.24	07.06	19.24	07.21	19.39	10.06	22.24	11.06	23.24	06.21	18.39	05.21	17.39	08.21	20.39	09.21	21.39	07.51	20.09	09.06	21.24
18. Mars	08.42	21.01	07.42	20.01	07.57	20.16	10.42	23.01	11.42	-	06.57	19.16	05.57	18.16	08.57	21.16	09.57	22.16	08.27	20.46	09.42	22.01

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Vika 10 – 11. mars
Vinnaratøl: **06 - 10 - 24 - 25 - 28 - 29 - 35**

Eykatøl: **20 - 31**

7 vinnaratøl:	**1.214.719,- kr.**
6 vinnarat.+ eykatal:	**57.567,- kr.**
6 vinnaratøl	**4.576,- kr.**
5 vinnaratøl:	**167,- kr.**
4 vinnaratøl:	**46,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Vika 10 – 11 . mars
Jokaratal: **9 - 1 - 6 - 1 - 5 - 9 - 6**

Øll 7 rætt:	**Eingin/0,- kr.**
6 aftastu rætt:	**136.224,- Kr.**
5 aftastu rætt:	**21.534,- kr.**
4 aftastu rætt:	**2.098,- kr.**
3 aftastu rætt:	**234,- kr.**
2 aftastu rætt:	**50,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

TIPS 13 úrslit
Vika 10 – 11. mars

1.	Bolton - West Ham	**1**
2.	Portsmouth - Manchester C	**1**
3.	Everton - Fulham	**1**
4.	Sunderland - Wigan	**2**
5.	Charlton - Middlesbrough	**1**
6.	Reading - Watford	**x**
7.	Coventry - Sheffield U	**1**
8.	Brighton - Preston	**x**
9.	Wolverhampton - Cardiff	**1**
10.	Sheffield W - Queens Park R	**x**
11.	Derby - Burnley	**1**
12.	Crewe - Southampton	**x**
13.	Hull - Plymouth	**1**

Prognosa:

13 rætt:	**14.526,- kr.**
12 rætt:	**386,- kr.**
11 rætt:	**42,- kr.**
10 rætt:	**15,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

5 707265 100036 >